# Renn, Pavlyuchenko

Nýggi Tottenham-venjarin Harry Redknapp sigur nú, at tað skal ikki nøkur doktararitgerð til fyri at venja Tottenham. Síðani Redknapp gjørdist venjari í felagnum, hevur liðið fingið 7 stig í 3 dystum. Leygardagin vann Tottenham á Liverpool, og innskifti álopsspælarin Pavlyuchenko skoraði sigursmálið. - Tá eg skifti hann inn í seinna hálvleiki, segði eg bara við hann, at hann for h... skuldi renna eitt sindur, greiðir Redknapp frá.



# Christian Høgni á talvuna

Christian Høgni Jacobsen var millum málskjúttarnar, tá AB á útivølli spældi 2-2 móti Thisted í gjár. Støðan í hálvleikinum var 0-0. Framherjin javnaði til 1-1, tá seinna hálvleiki var tríggjar minuttir gamal. Hann var fyrstur á bóltinum eftir innlegg, tá málverjin var ófantaligur og onkursvegna misti bóltin um málstrikuna. Christian Høgni Jacobsen spældi samfullar 90 minuttir. AB er í løtuni á fjórða plássinum í næstbestu donsku deildini, fýra stig eftir oddaliðið Lyngby, sum hevur Henrik Larsen sum venjara.



# Tí vann Støkk

**Hetta var tað, sum dómsnevndin á Fimleikafagnaðinum førdi fram, tá tað varð kunngjørt, at Støkk hevði vunnið fimleikafagnaðin**

- Tey høvdu eina góðu av lýsing av evninum, sum hesa ferð æt mótsetningar.
- Tey brúktu gólvið øgiliga væl.
- Venjararnir høvdu rakt støðið hjá fimleikarunum væl, tí øll dugdu tað, sum tey skuldu.
- Tey dugdu væl at brúka tónleikin, og tónleikurin var væl valdur til evnið.
- Tey høvdu eina samanhangandi lýsing frá byrjan til enda.
- Tey høvdu framúr flottar búnar
- Talan var um gott drama ígjøgnum alla lýsingina av evninum.
- Og tey høvdu ein sera flottan enda á framførsluni.

-mørk



*Børnini sleppa eisini framat á fimleikafagnaðinum. Hesir kúllarnir vóru á liðnum hjá Ljósinum*





*Talan var um sera ítøkiliga lýsing frá Ljósinum. Her við muninum millum rík og fátøk*



*Tað krevur sín mann, um standast skal í hondstøðu út frá einum stiga. Men eisini tað megnaðu tey hjá Havnar Fimleikafelag*